## Verkætlan

Góðu foreldur

Her er stutt kunning um verkætlanina.

Verkætlanin er ein spurdómsstýrd uppgáva, har næmingarnir í eina viku arbeiða við einum sjálvvaldum partsevni, ið er knýtt at einum felags høvuðsevni. Verkætlanin endar við eini framløgu.

**Høvuðsevni:**

- Vit hava í felag gjørt eitt stórt hugarok fyri at finna eitt hóskandi høvuðsevni.
- Lærararnir "kókaðu" innkomnu evnini niður í 3 evni.
- Næmingarnir atkvøddu.
- Høvuðsevnið í verkætlanini gjørdist "Ung í Føroyum"

**Bólkar**

- Næmingarnir hava sjálvir valt seg í bólkar ella at skriva einsæris.
- Í hvørjum bólki eru í mesta lagi 3 næmingar.

**Partsevni:**

- Hvør bólkur hevur valt sær eitt partsevni, ið hóskar til høvuðsevnið.

**Spurdómar:**

- Næmingarnir orða fýra spurdómar; upplýsingarspurning, frágreiðingarspurning, metingarspurning og atgerðarspurning.
- Lærararnir vegleiða næmingarnar

**Áðrenn verkætlanina:**

- Næmingarnir skulu seta seg væl inn í partsevnið - og minnast at goyma keldur.
- Næmingarnir skulu hugsa um, hvønn teir kunnu tosa við, soleiðis at teir á besta hátt fáa svarað spurdómunum.
- Næmingarnir skulu fáa avtalur í lag (sum helst skulu liggja í arbeiðsvikuni).

**Tíðarkarmar fyri verkætlanina**

- Arbeiðsvikan er dagarnar 23.-27.jan.

- Framløguvikan er dagarnar 30.jan-2.feb.
    - Næmingarnir leggja fram ein dag og lurta eftir framløgunum hinar dagarnar
- Fríggjadagin 03.02.23 er vanlig undirvísing

**Arbeiðsvika:**

- Vanliga tímatalvan er niðurløgd.
- Næmingarnir arbeiða við verkætlanini í skúlanum frá kl. 08.00 – 14.00
    - Møtiskylda er á skúlanum kl. 8.00 og kl. 13.00. Annars kunnu næmingar fara út av skúlanum at hava samrøður, fara á bókasavn o.s.fr.
- Lærararnir eru saman við næmingunum í skúlanum frá kl. 08.00 – 14.00
- Endamálið er at svara spurdómunum. Her skulu næmingarnir leita sær vitan á alnótini, í bókum, hjá ymiskum fakfólkum osfr.
- Tað er umráðandi at næmingarnir hava góðar keldur at byggja verkætlanina á. Næmingarnir skulu hava í minsta lagi 6 ymiskar keldur.
- Allir bólkarnir brúka eina "kanal" á Teams, har teir samla keldur, tilfar o.a.
- Næmingarnir velja, hvørjar málbúnar teir nýta til framløguna. T.v.s. hvussu framløgan verður framd.
- Fríggjadagin 27. jan. kl. 12.00 letur hvør bólkur eina synopsu inn.
    - Næmingarnir fáa vegleiðing í, hvussu synopsan skal skrivast.

**Framløguvika:**

- Bólkarnir hava framløgu á uml. 20 minuttir.
    - Vit hava tosað eitt sindur um, hvussu ymiskar framløgurnar kunnu vera. (Næmingarnir fáa nærri kunning um framløgur og framløguhættir, tá ið tað nærkast)
- Næmingarnir kunnu velja, um teir skulu hava próvtal ella ikki
- Verkætlanin í 9. fl. er ein próvtøka.

**Tykkara leiklutur:**

Haldið teimum til, stuðlið teimum, hugnið um tey – og spyrjið inn til.